Ítrótta FAGNAÐUR

# ÁRSINS ÍtróttaVENJARI

***INNSTILLING:***

Ársins venjari leggur dent á rørsluføri og -gleði, samstundis sum hon/hann arbeiðir fram ímóti góðum úrslitum. Tann, ið fær heiðurin sum Ársins ÍtróttaVENJARI mennir íðkararnar bæði sum ítróttafólk og sum menniskju. Hann stimbrar og motiverar - og fær á tann hátt ítróttagleðina fram hjá sínum íðkarum.

Hesin venjarin skapar eitt ítróttaumhvørvi, ið rúmar bæði breidd og úrvali, har øll trívast saman og verða eggjað til at gera sítt besta bæði til venjing og til dystir/kappingar.

**Í grundgevingunum kunnu tit greiða frá, hvussu viðkomandi, sum tit skjóta upp, eitt nú:**

- Á serligan hátt viðvirkar til samanhaldið í felagnum
- Skapar rørsluføri og ítróttargleði á sínum liði
- Tekur sín ítrótt í álvara og er góð fyrimynd fyri onnur
- Hevur ein jaligan hugburð og góða orku
- Mennir íðkaran bæði sum ítróttarfólk eins og menniskja
- Altíð er til at stóla uppá
- Stimbrar og motiverar íðkararnar til altíð at geva sítt besta, á leikvøllinum og uttanfyri

Dentur verður eisini lagdur á, at Ársins ÍtróttaVENJARI arbeiðir sambært nýggju strategi'ini hjá ÍSF, sí:
https://isf.fo/i-felag-fram-imoti-felags-malum/

***Arbeiðsgongd:***

- Øll kunnu innstilla ein ítróttaVENJARA, sum viðkomandi metir hevur virkað fyri at rørsluføri og ítróttargleðina á serstakan hátt í undanfarna árið, og sum kanska eisini hevur fingið góð úrslit við sínum liði.
- Nevnd Poul E Petersen tekur støðu til, hvør skal hava heiðurin sum ársins ÍtróttaVENJARI.
- Ein persónur verður kosin ÍtróttaVENJARI hvørt ár. Nevndin kann taka avgerð um, at eingin venjari verður heiðraður.

**Innstillingar verða sendar inn við eini leinkju, sum verður send út við telduposti,**
**ella løgd á heimasíðuna og SoMe**